Sambandsflokkurin
Ein ríkur felagsskapur



Nývaldi fólkatingsmaðurin, Edmund Joensen, á fundi við danska forsætisráðharran, Anders Fogh Rasmussen, stutt eftir fólkatingsvalið í november. Edmund Joensen, sum er løgtingsformaður fram til løgtingsvalið, fer nú undir arbeiðið í Fólkatinginum. Hann leggur dent á at samstarva við stjórnina, so ítøkilig úrslit kunnu fáast burturúr fyri Føroyar. Edmund Joensen stillar upp til løgtingsvalið 19. januar.

*Mynd: Símun J. Hansen*

# Spennandi nýggjár

## við politiskum avbjóðingum

Her á gáttini til nýggja árið sendi eg øllum føroyingum bestu nýggjárskvøður. Ein serlig heilsan til tykkara, ið stuðlaðu Sambandsflokkinum á fólkatingsvalinum og eisini mær persónliga.

Í mangar mátar byrjar nú eitt spennandi ár við nógvum møguleikum.

Nýggja Løgtingið fær møguleika at viðgera og samtykkja fleiri mál, ið kunnu flyta okkum væl fram á leið sum samfelag. Føroyar mugu rætta kós við í størri mun at koma sær upp í altjóðagerðina og venda henni til egnan fyrimun. Eisini skulu bleyt virði sum t.d. útbúgving, trivnaður og livikor sum heild raðfestast hægri enn asfalt og beton.

Á Fólkatingi er avbjóðingin at samstarva við hegni, so vit í Føroyum fáa ítøkilig úrslit burtur úr tí, sum Ríkisfelagsskapurin bjóðar okkum, ið eru partur av honum.

Eitt stórt nýggjársynski er, at veljarar til løgtingsvalið tann 19. januar 2008 lata vit og skil ráða og tí velja Sambandsflokkin. Í flokkinum hava vit dirvi at stýra Føroyum búskaparliga sunt, so pláss verður til at styrkja bleytu virðini.

*Við bestu nýggjárskvøðum*

***Edmund Joensen***

# Fimm tey mest seldu bilmerkini




*Mest seldi Suzuki er Swift við 116 bilum, meðan 107 Suzuki Grand Vitara vóru seldur í sama tíðaskeiði*




*Mest seldi Toyota er Corolla/Auris við 128 bilum. Corolla skifti navn til Auris fyrr í ár*

**Sølan av nýggjum bilum frá 1. januar til 20. desember 2007**

Suzuki gjørdist aftur í ár mest selda bilmerki í Føroyum við tilsamans 367 bilum, Toyota 324, Ford 241, Citroën 200 og Peugeot 147.

Mest seldi Suzuki er Swift við 116, mest seldi Toyota er Corolla/Auris við 128 bilum, mest seldi Ford er Transit við 57 bilum, mest seldi Citroën er Berlingo við 84 bilum, og mest seldi Peugeot er 207 við 39 seldum bilum.

Í tíðaskeiðinum 1. januar til 20. desember vóru seld 2779 akfør í Føroyum, harav 1789 persónbilar, 419 vørubilar, 20 hýruvognar og 29 lastvognar, Fyri fyrstu ferð er ein diplomatbilur skrásettur í Føroyum.

*Kelda: Akstovan*

# Mátti skilja menn og konur sundur

Tvær ferðir í gjárkvøldið mátti løgreglan til hjálpar, tí pør vóru blivin óklár í brennivíni.

Í tí eina førinum var konan so full og ólátað, at løgreglan tók hana við á støðina, har hon mátti gista og sova rúsin av sær, áðrenn hon fór heimaftur í morgun.

Í hinum førinum var støðan meiri alvorlig, tí har hevði maðurin sligið konuna, so hon fekk skaða, tó at hann ikki var álvarsligur. Í hesum føri tók løgreglan málið í so stórum álvara, at maðurin varð tikin við á støðina at sova rúsin av sær. Áðrenn hann slapp útaftur, fekk hann so eisini at vita, at hendingin førir til, at hann nú er skuldsettur fyri harðskap ímóti konuni.

**-Áki-**